# LSH brillieraði við

## Fyri fleiri partar í bjargingarvenjingini á flogvøllinum datt meiningin niðurfyri, tí Landssjúkrahúsið tók seg úr venjingini í síðstu løtu. Peningatrot segðist vera orsøkin, men spurningurin er meira, um LSH hevur ráð ikki at vera við



VENJING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað, sum fall mest í eyguni, var tað, ið ikki var har.

Stórstílaða venjingin vesturi á flogvøllinum, sum fleiri ymiskir instansir stóðu fyri í felag, fall munandi í virði, tá Landssjúkrahúsið valdi at taka seg burtur úr venjingini í seinastu løtu.

Tey høvdu annars verið við í fyrireikingini til bjargingarvenjingina, ein fyrireiking, ið byrjaði einaferð tíðliga í summar.

Fyri Vága Floghavn og fyri Altantic Airways hevði tað kortini ikki so nógv at siga, at Landssjúkrahúsið kortini ikki var við, men fyri løgregluna, sum stóð fyri tí yvirorðnaða samskiftinum, og fyri venjingina sum heild, var tað ein stórur smeitur, at ein so týdningarmikil liður ikki var við.

Tað teknaði heldur ikki gott fyri bjargingarvenjingina, at hon ikki kom í gongd fyrr enn hálvan tíma eftir, at hon eftir ætlan skuldi byrjað. Tað gjørdist ongantíð heilt greitt, hvør bíðaði eftir hvørjum, men venjingin, sum skuldi byrja klokkan 16.10 byrjaði ikki fyrr enn 16.40.

Stórir partar av venjingini gingu eftir ætlan, og burtursæð frá at hol kom á mannbornu skúmsproytuna gekst rímiliga væl hjá sløkkiliðnum at basa eldinum.

### Skavankir

Fyrireikararnir kundu eyðvitað ikki brúka eitt veruligt flogfar til venjingina, og tí vóru »make-shift« kulissur nýttar í staðin. Til nasapartíið var ein vognur av einumhvørjum slagi nýttur, og halapartíið var ein gamal bussur.

Miðan av flogfarinum var formað sum veingjaparturin og skuldi sum so bara nýtast sum bál og sløkkiroynd hjá sløkkiliðnum. Og tað var eisini í lagi.

Tað var eitt rættiliga fitt lot, meðan bálið brendi, og tjúkki roykurin frá hópinum av bildekkum lá fram við jørðini – beint móti, har ein partur av statistunum, sum ímyndaðu flogferðafólk, lógu. At tey tóku seg nakað undan nógva roykinum er skiljandi, um enn ikki serliga veruleikakent.

Somuleiðis blivu tvey av «ferðafólkunum« undirdýkt í skúmi, tá hin eini sløkkibilurin ikki slapp eldinum nóg nær og í staðin altso sprændi hesi bæði undir í skúmi.

Tað mest óhepna við venjingini var tó, at bjargingarfólkið mátti bera fólk á børum til væruvognar og onnur fyrifallandi akfør heldur enn til veruligar sjúkrabilar.

Tað tók ein stóran part av veruleikakensluni og harvið partvís venjingini burtur.

### Tvinnir eru kostirnir...

Eingin av fyrireikarunum søgdu tað beinleiðis, men kenslan av, at Landssjúkrahúsið hevði tikið venjingina við nøsini var eyðsýnd.

Tað er eisini óskiljandi, at ein so týdningarmikil partur av venjingini ikki tekur lut. Tað er gamaní eingin loyna, at sjúkrahúsverkið í síni heild er sett undir sparingar, men tað er líka so greitt, at hendir ein vanlukka, sum simulerað varð í gjár, verður Landssjúkrahúsið ein stórur og týdningarmikil liður í bjargingini. Og tí er eisini upp á sítt pláss at spyrja, um LSH hevur ráð ikki at vera við.

Restin av fyrireikarunum hava tí havt tvinnar kostir í at velja, tá LSH gav avboð, antin at gjøgnumføra eina amputeraða bjargingarvenjing og so fáa tær royndir burtur úr sum fáast kundu, ella at sleppa øllum, og so bara irða seg um spilt fyrireikingararbeiði.

Tað er klárt, at tá ein slík bjargingarvenjing ikki hevur so stóran viðspælara við, so missur venjingin samlað virði. Hinvegin er eingin ivi um, at partar av venjingini hava givið fyrireikarunum hópin av roynd-um. Sløkiliðini hava fingið royndir, Vága Floghavn hevur somuleiðis fingið royndir og tað hevur Atlantsflog eisini. Hesir partar av venjingini vóru ikki ávirkaðir av, um Landssjúkrahúsið og ambulansatænastan vóru við ella ikki.

### Nøgdir hóast alt

Venjingin gjørdist ongantíð optimal. Nú er ilt at meta um, hvussu stóran leiklut avboðið hjá Landssjúkrahúsinum hevur havt í samlaðu fyrireikingini, serliga tá havt verður í huga, at LSH var við í fyrireikingunum.

Men hóast ikki fullkomin, vóru bæði Dávur Reinert Hansen, stjóri í Vága Floghavn, og Pætur Rasmussen, tilbúgvingarleiðari hjá Altaltic Airways, væl nøgdir við teirra part av bjargingarvenjingini.

- Vit fingu royndarkoyrt tær skipanir, sum vit hava í tilbúgvingini, og fyri okkum hevði tað ongan týdning, at Landssjúkrahúsið ikki var við, sigur Pætur Rasmussen.

Og eisini fyri Vága Floghavn var venjingin nøktandi, tí tá sløkkingararbeiðið var av, var teirra lutur sum so liðugur í venjingini.

- Tað hevði sjálvandi verið ynskiligt, at Landssjúkrahúsið og ambulansatænastan vóru við, men fyri okkara leiklut hevði tað ongan týdning, sigur Dávur Reinert Hansen.

### Stórt spell við LSH

Jón Klein Olsen, politiinspektørur, var tó heldur meiri avgjørdur um avboðið frá Landssjúkrahúsinum.

- Tað er spell og synd fyri tey fólkini, sum skuldu verið við til venjingina. Men hinvegin skulu vit minnast til, at teirra lutur ikki lá eftir, tá fyrireikingarnar vórðu gjørdar, sigur Jón Klein Olsen.

Hann var sjálvur staddur á alarmcentralinum, og hann hevði eina greiða